T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

**KUNNGERÐ**

Boðað verður frá, at týsdagin 21. november 2000 skulu veljast 3 limir í ávikavist

**Hvítanesnevnd Tórshavnar býráðs**
**Kaldbaksnevnd Tórshavnar býráðs**
**Kollafjarðarnevnd Tórshavnar býráðs**

Valskeiðið er fýra ár.

Í atkvøðuøkinum ávikavist á Hvítanesi, í Kaldbak og Kollafirði hava borgarar valbæri og valrætt, sum standa á vallistanum til býráðsvalið.

Valevnislistarnir skulu vera valnevndarformanninum ella kommununi í hendi á býráðsskrivstovuni í seinasta lagi týsdagin 31. oktober 2000, kl. 18.00.

Ein av stillarunum skal handa valevnislistan og navnalista yvir stillararnar, har starv og bústaður teirra standa á.

Tíð og stað verða kunngjørd seinri.

Tórshavn, tann 21. oktober 2000

Valnevnd Tórshavnar býráðs

S N A R S K I V A N





**Føroya størsta úrval av seymitilfari**

Til dømis hava vit repsbond - belegningsbond - bummulls- og silkiskrábond - ullbond - pyntibond - silkibond í fleiri breiddum og litum - beltabond í fleiri breiddum - svart floyalselastik til beltir í trimum breiddum - anoraksnórar - silkisnórar - frynsar festonblondir og tráðblondir. Ymiskan tráð til seymimaskinur og overlockmaskinur - kinesartráð - ullint og merciserað stoppigarn og elastiktráð. Nógv ymisk sløg av lynlásum bæði heil og deilbar í nylon og metal. 1000 tals sløg av knappum í fleiri støddum og litum. Trykknappar - snapulhektir - niðurdeilshektir og buksuhektir - vestaspennir - yviralls-spennir og selaspennir. Elastik í fleiri breiddum bæði svart og hvítt - sokkastroppar - ermabøð - lappar at bøta við og nógv ymisk merkir at seta uppá klæðir. Pennar at merkja klæðir við. Nálir til seymimaskinur og spolar til ymiskar seymimaskinur. Stórar stoppinálir og aðrar nálir - fingurbollar - krit - kalkerpappír - mynsturpappir - Burda mynstur - Multisnit mynstur og nú eisini **ONION** mynstur sum eru sera løtt og einkul við fleiri støddum í, bæði til vaksin og børn. Fleiri ymiskar støddir av saksum, eisini til **vinstru hond**. Vit hava eisini ***storkasaksin***.

Ein hóp av nýmótans meturvørum, til vaksin og børn, til troyggjur, buksur, kjólar, blusur, jakkar og annað er beint nú heimkomið. Vliesoline hvítt og svart í ymiskum tjúktum. Vlisofix og fóðurtoy bæði silki og polyester.

**Kom inn og síggj okkara stóra úrval.**

Vit senda eisini prøvar.

Sosialurin - 311820

**SP/F MARJUN HEIMÁ**

C. Pløyensgøta 4 • 100 Tórshavn• Tel. 31 25 31 • Fax 31 23 19



**DANNY TRANSPORT**

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 1062, **P/F Formula.fo, 100 Tórshavn.**

**Vi›tøkur broyttar:** 24.08.2000.
**Kapitalur:** Hækking vi› kr. 5.000.000,00 til kr. 10.000.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 5.000.000,00 vi› grunshækking. Flokkar: A kr. 9.700.000,00 og B kr. 300.000,00
**Nevnd:**
Farin frá sum forma›ur: Regin Joensen, Argjabo›agøta 32a, 160 Argir.
Innkomin sum forma›ur: Torkil Holm Petersen, Skemmingsgøta 26, 100 Tórshavn.
Farin úr nevndini: Marit Holm Petersen, Skemmingsgøta 26, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Fró›i Magnussen, Oman Vi›arlund 15, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Torkil Holm Petersen, Skemmingsgøta 26, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 19. oktober 2000

Kristin Balle

---


www.wenzel.fo

Ford


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 3081

**Navn:** P/F Gjógv Holding
**Adressa:** 476 Gjógv

**Kommuna:** Gjáar Kommuna
**Stovningardato:** 05.10.2000
**Vi›tøkudato:** 05.10.2000
**Kapitalur:** Kr. 500.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kr. 500.000,00 í ø›rum vir›um til kurs 100.
**Stovnari:** Lennart á Grømma, 476 Gjógv.
**Nevnd:** Sigmund Poulsen, Undir Gráasteini 17, 100 Tórshavn (forma›ur), Lennart á Grømma, 476 Gjógv og Hans Trúgvi Teirin, Kálvager›i 4, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Lennart á Grømma, 476 Gjógv.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur bundi› vi› undirskrift av stjóranum ella av tveimum nevndarlimum í felag.
**Grannsko›ari:** : Sp/f HanSam, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.07. - 30.06
**Fyrsta roknskaparár:** 05.10.2000 - 30.06.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka umsitingar- og fíggjarvirksemi og anna› starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 19. oktober 2000

Kristin Balle

---






**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 1784, **P/F Tór Data, 100 Tórshavn.**

**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Andreas Benny Lindenskov Samuelsen, M. Heinasonargøta 8, 100 Tórshavn (forma›ur), Lisbeth Beate Lindenskov Petersen, Handaratún 9, 100 Tórshavn (næstforma›ur), Kristina Malena Samuelsen, Lítlatrø› 3, 100 Tórshavn, Alfred Petersen, Su›uroyarvegur 8, 100 Tórshavn og Beate Lindenskov Samulesen, Var›alág 4, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Hjalgrim Lindenskov Samuelsen, Lítlatrø› 3, 100 Tórshavn.

Felagi› er fari› í likvidatión vi› Alfred Petersen, advokati, J. Paturssonargøta 3, Box 164, 110 Tórshavn sum likvidator.

Skráseting Føroya tann 19. oktober. 2000.

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 736, **P/F Com Data 736, 700 Klaksvík.**

**Vi›tøkur broyttar:** 07.07.2000.
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Olivur Thomsen, Gar›avegur 49, 700 Klaksvík.
Innkomin í nevndina: Símun Pauli Konoy, Geilin 24, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur bundi› vi› undirskrift av einum stjóra saman vi› tveimum nevndarlimum ella av allari nevndini saman.

Skráseting Føroya tann 18. oktober 2000

Kristin Balle

---


Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3079

**Navn:** Sp/f Vakstrarhúsi›
**Adressa:** 175 Kirkjubøur

**Kommuna:** Kirkjubøar Kommuna
**Stovningardato:** 31.08.2000
**Vi›tøkudato:** 31.08.2000
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Páll Sverri Patursson, 175 Kirkjubøur.
**Stjórn:** Gu›ri› Tórsheim, 175 Kirkjubøur.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av einum stjóra.
**Grannsko›ari:** : P/F Grannsko›aravirki› Inpact, R. C. effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 31.08.2000 - 31.12.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og reka vakstrarhús, handil og anna› starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 18. oktober 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 590, **P/F Petersen & Guttesen, 100 Tórshavn.**

**Nevnd:**
Farin frá sum forma›ur: Kim Morgan Ejdesgaard, Spógvavegur 44, 100 Tórshavn.
Innkomin sum forma›ur: Torkil Holm Petersen, Skemmingsgøta 26, 100 Tórshavn.
Farin úr nevndini: Marit Holm Petersen, Skemmingsgøta 26, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Fró›i Magnussen, Oman Vi›arlund 15, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Torkil Holm Petersen, Skemmingsgøta 26, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 19. oktober 2000

Kristin Balle

---



# Handverkarar søkjast til Elfelagið SEV

Søkt verður eftir tveimum handverkarum at arbeiða sum linjumenn hjá SEV.

Arbeiðsøkið verður fyri meginpartin í Suðurstreymoy. Arbeiðið fevnir um hald og nýgerð av linjum, kaðalum og trafostøðum.

Handverkarar við sveinabrævi sum elektrikarar hava fyrimun, men kunnu fólk við aðrari handverkaraútbúgving eisini koma upp á tal, t.d. jarn- og húsasmiðir. Umsøkjarar skulu kunna byrja í starvinum innan 1. januar 2001.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Peter L. Gaardbo hjá SEV á tlf. 311366.

Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum sendast til Elfelagið SEV, Landavegur 92, Postrúm 319, 110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 20. november 2000.

Tórshavn, tann 18. oktober 2000

**Elfelagið SEV**

# Lærari

Søkt verður eftir lærara til Fuglafjarðar skúla at byrja umleið 20. november. Starvið er fyri lærara, sum hevur barnsburðarfarloyvi í umleið 24 vikur.

Tímatalva:
5 t. í fø. 10. fl.
2 t. í tilevning 10. fl.
2 t. í heimk. 3.–4. fl.
10 t. serligan tørv
Flokslærari í 10. fl.

Starvið verður lønt samb. galdandi avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir saman við ljósriti av próvskjølum o.ø. verða at senda skúlanevndini í seinasta lagi týsdagin 31. oktober kl. 16.00.

**Fuglafjarðar skúlanevnd**
v/ Terja á Lakjuni
FO-530 Fuglafjørður

# Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA

verða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 14.–15. nov. 2000, og á Landssjúkrahúsinum 16. nov. 2000.

Tíð fæst við at ringja á tlf. 455463, týsdag og hósdag kl. 10–12, í seinasta lagi týsdagin 7. nov. 2000.

# Ársfundur hjá Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum

Leygardagin tann 21. okt. 2000 kl. 14.00 skipar Rúsdrekka & Narkotikaráðið fyri ársfundi á Sjómansheiminum í Runavík.

Í ár verður evnið: »Børn, sum vaksa upp í heimum, har rúsevni verða misnýtt«.

Ráðið hevur biðið Lisbeth Rask, kliniskan sálarfrøðing, sum í nógv ár hevur starvast við børnum og familjum, at halda fyrilestur um hvussu vit kunnu hjálpa hesum børnum og foreldrum teirra.

Haraumframt hava vit heitt á tvey onnur, sum í Føroyum hava havt tilknýti til henda trupulleika, at siga sínar hugsanir um evnið.

Fundarskráin er hendan:

| | |
|---|---|
| Kl. 14.00: | Formaðurin bjóðar vælkomin |
| Kl. 14.10-15.00: | Lisbeth Rask heldur fyrilestur |
| Kl. 15.00-15.20: | Kaffisteðgur |
| Kl. 15.20-15.30: | Beate L. Samuelsen, formaður fyri Barnaverndini í Havn, lýsir evnið frá barnaverndarinnar sjónarhorni |
| Kl. 15.30-15.40: | Arne Ludvig, fyrrverandi skúlastjóra, lýsir evnið frá skúlans sjónarhorni |
| Kl. 15.40-15.50: | Formansfrágreiðing |
| Kl. 15.50-16.10: | Orðaskifti |

# Arbeiðsfólk søkist

Søkt verður eftir tímaløntum arbeiðsfólki til vegir og kloakkir og annað fyrifallandi arbeiði hjá kommununi.

Starvið verður roknað sum fulltíðarstarv.

Lønin verður sett eftir sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 443006.

Umsókn saman við skjølum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 26. oktober 2000.

**Leirvíkar Kommuna**
Postrúm 42
520 Leirvík

# Umboð

Er nakar, sum hevur eitt einaumboð ella eina minni heilsølu, sum kundi hugsað sær at selt, eri eg møguliga møguliga ein keypari. Alt hevur áhuga.

Skriva til:

**Sosialurin,**
Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 21.10.

# Frá 1000 ára haldinum

Leygardagin 21. oktober kl. 10.30 verður kirkjukonsert (matiné) í Havnar Kirkju.

Petra Iversen syngur
Stamen Stantchev, piano,
og Edvard Nyholm Debess, kontrabass
spæla sálmar

**FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR**
Postboks 1121 · tlf. +298 321132
+298 321761 · FO-110 Tórshavn

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til 4 ára gamlan drong við Down Syndrom, í Eysturoy.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður í Kongshavnar Barnagarði í Saltangará og í heiminum, men tó í neyvum samstarvi við foreldrini, Almannastovuna og onnur fakfólk.

Arbeiðið fevnir um at hjálpa barninum í samskiftinum við hini børnini í dagstovninum, at stimbra barninum við venjingum og spæli, og annars at geva honum ein innihaldsríkan gerandisdag, einsamøllum og saman við øðrum. Stuðulin skal eisini kunna fara við honum til fysioterapi o.a. uttan fyri stovnin.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.

Setunartíðin er frá uml. 15.11.00.

Lønar- og setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi skjótast gjørligt og í seinasta lagi 05.11.00 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Eysturoyar deild
att. Bettina Christiansen
Heiðavegur
600 Saltangará

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja tlf. 314822, Ragnhild Dahl.

# Føroya Tele

**Hús at leiga**

Til marknaðarstjóra okkara leita vit eftir húsum í Tórshavn ella Hoyvík.
At leiga frá 1. desember.

Áhugað kunnu venda sær til

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
100 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697